# Væl útgjørdur og økonomiskur Saab 9-3 Sport Sedan

**Saab eru komnir á marknaðin við einum kvikum og økonomiskum 9-3 Sport Sedan við 1,8 litur bensinmotori og 122 hk. Bilurin er sera væl útgjørdur og fæst til ein avgjørt kappingarføran prís**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Ein væl útgjørdur Saab 9-3 Sport Sedan við 1,8 litur bensinmotori og 122 hk.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Saab 9-3 Sport Sedan er størsta kollvelting í søguni hjá Saab, og bilurin fær sera góð ummælir í bilbløðum kring allan heim.

Sport Sedan fæst við fýra ymiskum bensinmotorum frá 122 til 210 hk og einum TiD turbodeselmotori við 125 hk.

Saab bilarnir kunnu bíleggjast soleiðis, sum kundin ynskir tað, sum t.d. bilurin, vit hava myndir av her, sum er ein 9-3 Sport Sedan við 1,8 litur motori og 122 hk. Motorurin hevur innbygdan katalysator og er økonomiskur í allar mátar. Elektrohydrauliska servostýringin ger sítt til at bensinnýtslan verður minni.

Í standard útgávuni kostar hesin bilurin kr. 255.000,- men hesin er eftirmonteraður við E-pakkanum sum umfatar: leðurratt við radiostilling, alu-look á instrumentborðinum, fartpilot, fløguspælara og tokulyktir. Umframt tað hevur hann eisini leðurkabinu, automatiskt klimaanlegg og metallakk. Við øllum hesum kostar bilurin kr. 295.000,-


*Bilurin innan við t.d. leðurratti við radiostilling, fartpiloti og fløguspælara, leðurkabinu og automatiskum klimaanleggi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Nógv innbygd trygd

Bæði hvat aktivu og passivu trygdini livir 9-3 Sport Sedan upp til tað, sum vit kunnu vænta av einum Saab í 2004. Bilurin hevur t.d. Traction Control System (TCS), (MBA) og (CBC), ið ger at til ber at bremsa og stýra samstundis, uttan at bilurin glíður út til síðuna. Nógvar ymiskar trygdarskipanir, ið eru innbygdar í bilin, verja bilføraran og tey ferðandi sum t.d. Saab Aktive Head Restraint (SAHR) nakkapúturnar, sum verja væl móti skaða á hálsin og nakkan.

## Saab 9-3 Sport Sedan 1,8i

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,8 litur 4 syl. bensin 122 hk |
| 0-100 km/t | 11,5 sek |
| Bensinnýtslaa | 12,7 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 463,5 cm |
| Breidd | 176,2 cm |
| Hædd | 146,6 cm |
| Eginvekt | 1425 kg |
| Viðførisrúm | 425 litrar |
| Prísur | kr. 295.000,- + skrásetingargjald kr. 2.850,- |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v. Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.bilarge.fo |



*Bæði hvat aktivu og passivu trygdini livir 9-3 Sport Sedan upp til tað, sum vit kunnu vænta av einum Saab í 2004*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Nýggi Opel Astra verður her sýndur fram á Copenhagen Motor Show 2004*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nýggjur og størri Opel Astra

**Ein nýggur og størri Opel Astra var fyrstu ferð sýndur fram á altjóða bilaframsýningini í Frankfurt seinasta heyst og á Copenhagen Motor Show 2004 í apríl. Ein spennandi framkomin bilur sum Opel væntar sær nógv av**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Opel kemur í sera harða kapping við nýggja Astra, sum skal kappast í sokallaða Golf-klassanum, har fleiri av kappingarneytunum júst eru komnir á marknaðin við nýggjum modellum.

Nógv er gjørt burtur úr útsjóndini, smart design við lyktum í nýggjasta móta.

Teir sum hava royndarkoyrt nýggja Astra geva honum sera góð viðmælir. Bilurin er størri enn forgangarin og er sum ein stórur bilur at sita í og koyra. Nógv er gjørt burtur úr komfortinum, setrini eru góð og stútt og alt virkar ergonomiskt rætt.

Innan er einki sum minnir um forgangaran. Alt tilfarið er í góðum kvaliteti og líkist nógv tí størra Opel Vectra. Í miðjuni á instrumentborðinum er ein lutfalsliga stórur skíggi, har man t.d. sær hvussu radio er stillað, hitan uttan fyri og evt. feilmeldingar. Skíggin er standard á øllum modellunum.

Koyrieginleikarnir eru soleiðis, sum man kann vænta av einum nýggjum framkomnum bili í hesum klassanum - heilt í topp.

Í fyrstu atløgu kemur Astra við tveimum motorstøddum: 1,4 litur Twinsport við 90 hk og 1,6 litur Twinsport við 105 hk. Seinni í ár koma aðrar útgávur sum t.d. ein 2,0 litur bensinmotorur við turbo og tveir 1,7 litur CTDI dieselmotorar við ávikavist 80 og 100 hk og ein 1,9 litur diesel við 150 hk.

Útgerðin er sera umfatandi við t.d. aircondition sum standard, seks airbag, ABS bremsuskipan við EBD og bremsuassistenti. Eisini fæst Astra við nógvari eykaútgerð sum t.d. navigatiónsskipan, sportsundirvogni, og Xenon forlyktum, sum snara við, tá bilførarin snarar rattinum.



*Nógv er gjørt burtur úr útsjóndini. Astra hevur smart design, og bilurin fær sera góð ummælir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*


*Opel Astra innan. Alt er gjørt úr góðum kvaliteti og nýggi Astra líkist nógv tí størra, Vectra, innan*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Opel Astra 1,6 16V

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,6 litur 4 syl. bensin 105 hk |
| 0-100 km/t | 12,3 sek |
| Bensinnýtsla | 15,2 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 425,0 cm |
| Breidd | 175,0 cm |
| Hædd | 146,0 cm |
| Viðførisrúm | 350 litrar |
| Prísur | kr. 198.000,- |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v. Oyggjarvegin<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.bilarge.fo |